# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR @SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Tillukku til B36

Mikukvøldið skrivaði B36 ein flottan part av føroyskari fótbóltssøgu, tá teir sum fyrsta føroyska felag spældu seg víðari í Evropisku meistarakappingini.
Grundarlagið undir sigrinum á maltesiska Birkirkara varð skapt á Malta, har føroyska liðið vann ein flottan 3-0 sigur, og tí var javnleikurin á heimavølli mikukvøldið nóg mikið at tryggja víðari luttøkuna.

Hóast maltesiska liðið kanska ikki telist millum tey sterkastu, sum hava vitjað her á landi, so er sigurin hjá B36 eitt greitt tekin um, at føroyskur fótbóltur – eisini í felagshøpi – hevur gjørt stór framstig, síðani altjóða luttøkan varð veruleiki í 1992. Og at talan eisini er um næsta ár á rað, at B36 spælir seg víðari, eftir at teir í fjør bastu íslendska ÍBV í UEFA-Cup, staðfestir eisini støðuna hjá B36, sum í løtuni má sigast at vera ein av fremstu flaggberum okkara í altjóða høpi.

Nú bíðar helst største avbjóðingin, sum nakað føroyskt felag hevur havt, tá føroyameistararnir komandi mikudag trína inn á velduga heimavøllin hjá Fenerbache, sum sigst hava nakrar av mest fanatisku heimaáskoðarunum í Evropa. Ein uppgáva, sum krevur bæði hegni og hepni – men ikki minst dirvi og áræði. Og vilja vit nýta høvi til at ynskja B36 bæði tillukku við bragdinum, sum higartil er framt – og góða eydnu í møtumiklu uppgávuni.

Og samstundis benda hini føroysku úrslitini á, at stór framstig eru hend. Iðranin um, at tað glapp á stokkinum hjá HB, gerst eisini eyka stór, tá hugsað verður um, hvat hetta kundi merkt fyri føroyskan fótbólt. Tí megna fremstu lið okkara at koma á eitt støði, har tey verða styrkismett soleiðis, at mótstøðuliðini koma úr allar veikastu londunum, kann víðari luttøka gerast mest sum gerandiskostur. Og bæði ítróttarliga og fíggjarliga vil altjóða luttøkan tá gerast eitt enn størri íkast til føroyskan fótbólt. Eitt íkast, sum enn einaferð undirstrikar tað rætta í avgerðini, sum á sinni varð tikin, tá føroyingar lupu upp í altjóða fótbóltsheimin.

**Sosialurin**

## Jógvan við Keldu og Rolf Guttesen avtala, at tilfeingisrenta fer í eftirlønargrunn!

ROLF GUTTESEN



Nýbrot hendi í gjár í orðaskiftinum um tilfeingisrentu av fiskaríkidøminum á føroykum sjóøki, sum eftir lógini er "ogn Føroya fólks". Í greinum í bæði Sosialinum og Dimmu, tekur Jógvan við Keldu, fyrrverandi landsstýrismaður og núverandi løgtingsmaður fyri Fólkaflokkin, nú undir við hugsanini um tilfeingis-rentu.

Jógvan skrivar, eftir at hava hugsa seg um og víst á nøkur fyrivarni, soleiðis: "Áhugavert kundi verið at spurt bæði løgmann, Rolf Guttesen og Kára Petersen, um nú tilfeingisrentan gjørdist veruleiki, um hon kundi verið brúkt t.d. til part av eftirlønargrunni fyri arbeiðaran í Føroyum, so hon veruliga kom á eitt neyðugt stað, heldur enn at farið beinleiðis í landskassan"

Har er bert eitt lítið fyrivarni í kósskiftinum, og tað er, at tilfeingisrentan ikki skal fara beinleiðis í landskassan, men í ein eftirlønargrunn, sum skal gera aldurdómin eitt sindur mildari hjá arbeiðandi fólkinum. Og tað má sigast at vera heilt rímuligt.

Eg haldi, at tað er fínt, at Jógvan sær, at hatta við einari góðari eftirløn, er nakað: "so hon (tilfeingisrentan) veruliga kom á eitt neyðugt stað.". Við hesum er vunnið nakað á tveimum týðandi økjum. Fólkaflokkurin skjýtur upp ein eftirlønargrunn fyri arbeiðaran í Føroyum, og samstundis fær hann, sum tann fyrsti, loyst tað konkreta málið við tilfeingisrentuni, at hon skal innkrevjast og hvussu hon kann brúkast. Hetta er veruligt nýbrot!

Eg kann sjálvandi ikki svara fyri, hvat ið løgmaður, Jóannes Eidesgaard og Kári Petersen, vilja svara. So væl kenni eg teir ikki. Og hvønn Kára Petersen, ið Jógvan meinar við, er ikki klárt. Har er bæði ein telvari, ein sangari, ein róðrarmaður, ein chaufførur, sum bera hetta góða navn. Kanska havi eg bara ikki lisið bløðini nóg væl.

Men eg ivist onga løtu í, at teir báðir, hvør Kári so er, taka hetta nýbrot, og hetta tilboð frá Fólkaflokkinum um sum nakað sera positivt. Jógvan rættir fram semjuhond, og eg skal vera skjótur at siga takk fyri

## Øll góðtaka Bill, men Bill vil ikki góðtaka meirilutan

HEÐIN D. POULSEN



Góði Bill, tú hevur so ilt av, at Føroya fólk fær møguleikan at velja. Ein kundi næstan fingið illgruna um, at um tú fekk loyvi til tað, so hevði tú sum ein annar einaræðisharri lagt teg út í hvørja einastu avgerð hjá tí einstaka. Tú leggur lítið í øl ella vín og tað góðtaka øll Føroya Fólk, hví kanst tú so ikki góðtaka tað, at flest Føroya fólk fegnast við møguleikan, at kunna keypa sær eitt glas av víni afturvið matinum? Eingin noyður Bill at drekka vín, sjálvt um hann skal ein túr við Smyrli ella á festival, har verður eisini í framtíðini hópin alkaholfríum vørum til keyps.

Illur???
Sig tína meining í Sosialinum




**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddir:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.